Brúkaravegleiðing

Skipan til avgreiðslu av lønum í ElektronPortalinum

Elektron
Mars 2013

Ingi Hentze

1. Innihaldsyvirlit

1. Innihaldsyvirlit 2
2. Skipanin stuðlar undir hesa mannagongd 3
3. Yvirskipað funktiónsgreining 3
4. Funkan „Yvirlit yvir innsendar lønarlistar“: 4
5. Funkan „Lønarflytingar“: 5
6. Viðmerkingar í samband við verksetingina í apríl 2013: 7

2. Skipanin stuðlar undir hesa mannagongd

Lønarfunkurnar í ElektronPortalinum og Lønarportalurin

Ætlanin er at flest møguligir lønarlistar verða innlisnir av kundanum sjálvum umvegis lønarPortalin. Men um ein lønarlisti, av einihvørji orsøk, ikki kann innlesast av kundanum, so kann peningastovnurin velja at brúka hesa skipan at innlesa lønarlistan. Tá vil skipanin sjálvvirkandi taka eitt ómaksgjald fyri hesa tænastu frá arbeiðsgevara.

3. Yvirskipað funktiónsgreining

Hesar funkur eru í skipanini

"Yvirlit yvir innsendar lønarlistar" gevur brúkaranum møguleika at:

- innlesa ymsar leitilyklar, og harvið fáa yvirlit yvir innsendar lønarlistar
- strika lønarlista
- fara inn á "Lønarflytingar"funkuna, og soleiðis koma inn á ynskta Lønarlistan

"Lønarflytingar", gevur brúkaranum møguleika at:

- stovna nýggjan lønarlista
- broyta upplýsingar í eksisterandi lønarlista
- stovna nýggjar lønarlinjur í eksisterandi lønarlista
- strika lønarlinjur í eksisterandi lønarlista
- goyma eksisterandi lønarlista sum eina lønarfílu
- heinta inn lønarfílu (og harvið stovna hana sum ein lønarlista)

Í báðum funkum kann ein, við at trýsta á print knøttin ovast í tólbjálkanum, fáa printað upplýsingarnar á síðuni.

4. Funkan „Yvirlit yvir innsendar lønarlistar“:



Vel	Stovn. dagf	Støða	Avgr. dagf.	Arbg. nr.	Brúkari	Arbg. ktnr.	Tal lønir	A-inntøka	Forv. upph.	Eftirløn	Frítíðarløn
	08.03.2013	Biði-staða	09.03.2013	313319	1610024	0002007322	7	4.000,00	45.100,00	2.000,00	0,00
	08.03.2013	Biði-staða	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	4	0,00	20.100,00	20.000,00	0,00
	08.03.2013	Stemmar ei	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	78	1.111,00	127.911,00	122.300,00	0,00
	08.03.2013	Biði-staða	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	4	0,00	20.000,00	20.100,00	0,00
	08.03.2013	Biði-staða	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	77	1.111,00	125.911,00	122.300,00	0,00
	08.03.2013	Biði-staða	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	76	1.111,00	122.911,00	122.300,00	0,00
	08.03.2013	Biði-staða	08.03.2013	313319	1610024	0002007322	64	1.111,00	100.311,00	99.300,00	0,00
	11.03.2013	Avgreiddur	11.03.2013	313319	FB1300	0002007322	2	10.000,22	9.500,22	0,00	0,00
	11.03.2013	Avgreiddur	11.03.2013	313319	FB1300	0002007322	2	0,00	25.000,55	0,00	0,00
	11.03.2013	Klárur	15.03.2013	313319	1610024	0002007322	33	1.111,00	100.311,00	0,00	0,00
	11.03.2013	Klárur	15.03.2013	313319	1610024	0002007322	4	295.000,00	290.000,00	0,00	1.300,00
	11.03.2013	Klárur	15.03.2013	313319	1610024	0002007322	5	296.000,00	291.000,00	0,00	1.300,00

Inngongd til mynd
Komast kann til myndina via menu-punktið ”Lønir”, og síðani myndina ” / Innsendir lønarlistar”.

Soleiðis er funkan ætlað at verða brúkt:
Við at innlesa neyðugar lyklateigar og trýsta á Dagfør-knøttin, koma ynsktu lønarlistarnir fram.

Strika ein lønarlista
Við at trýsta á prikkin í vinstru síðu á yvirlitinum, velur tú fyrst ein lønarlista - síðani trýstur tú at Strika-knøttin.

Soleiðis kemur tú inn á detailmyndina fyri ein lønarlista
Trýst við músini á stovningardagfestingina, sum sæst við bláari skrift. Tá tú hevur gjørt hettar, so vil detail-myndin við upplýsingum fyri júst ynskta lønarlistan koma fram.

5. Funkan „Lønarflytingar“:

Vinstra síða av myndini (allir upplýsingar síggjast ikki á myndini í senn):



Høgra síða av myndini:



Inngongd til mynd
Komast kann til myndina via menu-punktið ” Lønir”, og síðani myndina ”Lønarflytingar”.

Stovna lønarlista við lønarlinjum:
Innles fyrst upplýsingar í headara, tvs. arbeiðsgevara-tal, arbeiðsgevara-kontonummar v.m.
Innles síðani upplýsingar í eina ella fleiri lønarlinjur og trýst á "Goym lønir"-knøttin.
Lønarlistin við lønarlinjunum verður stovnaðar og ein tekstur verður vístur ovast "Broyting framd".
Tá broytingin er framd, verða flestu knøttar á myndini gjørdir óvirknir. Fyri at fáa teir virknar aftur, má ein fara innaftur á lønarlistan umvegis yvirlitsmyndina "Innsendir lønarlistar".

Stovnan av fleiri lønarlinjum:
Um ein, aftaná at "Goym lønir"-knøtturin er trýstur, ynskir at stovna fleiri lønarlinjur, so kann hettar gerast við at fara inn av nýggjum á lønarlistan umvegis yvirlitsmyndina "Innsendir lønarlistar", og tá trýsta á knøttin "Fleiri linjur". Og síðani innlesa nýggju lønarlinjurnar og trýsta á "Goym lønir"-knøttin.

Broytan av upplýsingum í lønarlista-headara ella lønarlinjum:
Um ein, aftaná at "Goym lønir"-knøtturin er trýstur, ynskir at broyta ein ella fleiri upplýsingar, so kann hettar gerast við at fara inn av nýggjum á lønarlistan umvegis yvirlitsmyndina "Innsendir lønarlistar", broyta teir ynsktu upplýsingarnar og trýsta á "Goym lønir"-knøttin.

Strika lønarlinju
Set flugubein í kassan í vinstru síðu út fyri tær ynsktu lønarlinjurnar, og trýst á "Strika linjur"-knøttin. Harvið verða ynsktu lønarlinjurnar strikaðar av myndini (enn eru tær ikki strikaðar í lønartalvuni). Minst til at enda við at trýsta á "Goym lønir"-knøttin, tí hettar dagførir lønarlistan í lønartalvuni.

Goym lista
Við at trýsta á hendan knøtt, kann lønarlistin goymast í einari fílu, fyri seinri at blíva heintaður inn aftur í ein nýggjan lønarlista.

Heinta lista
Við at trýsta á hendan knøtt, er møguleiki at innlesa eina lønarlista-fílu, sum antin er gjørd umvegis funkuna, ið er lýst beint her omanfyri, ella er gjørd í LønarPortalinum umvegis líknandi funku har.

Frágreiðing um støður á Lønarlistum:
Hesar støður kunnu fyrikoma:

"Stemmar ei":
Innlisnu totalarnir í lønarlista-headaranum, samsvara ikki við virðini í øllum lønarlinjum tilsamans.

"Bíði-støða"
Lønarlistin verður ikki avgreiddur so leingi lønarlistin hevur hesa støðu. Bert brúkarin kann áseta og broyta hesa støðu.

"Klárur"
Lønarlistin er klárur til avgreiðslu, og vil blíva avgreiddur so skjótt avgreiðsludagfestingin kemur.

"Avgreiddur"
Lønarlistin er avgreiddur. Nú ber ikki til at gera broytingar í, ella strika lønarlistan.

"Góðkennast av brúkara"
Lønarlistin er sendir inn umvegis LønarPortalin, og krevur góðkenning frá øðrum brúkara, áðrenn hann verður dagførdur.

"Avvístur av banka (dekningur)"
Lønarlistin er ikki dagførdur enn, tí dekningur var ikki á arbeiðsgevara-kontuni.

6. Viðmerkingar í samband við verksetingina í apríl 2013:

TAKS og føroysku peningastovnarnir hava í felag víðkað um verandi loysn til lønarútgjaldingar.

Orsøkin til tilgongdina, er ynski frá TAKS um, at fyrireika lønarmarkamótið til tvungið eftirlønargjald, ið ætlanir eru um í nýggja pensjónsreforminnum, sum ætlandi fær gildið frá 1. januar 2014.

Yvirskipaða málið við verkætlanini hevur verið at fyrireika lønarmarkamótið til tvungið eftirlønargjald, ið ætlanir eru um í nýggja pensjónsreforminum

Deilmálini hava verið hesi:

Laga tað soleiðis, at eftirløn verður flutt saman við lønini, á sama hátt sum frítíðarløn verður í dag

Gera tað møguligt at tryggja, at kravda eftirlønin verður flutt saman við lønini

Inntil 1. januar 2014 skal eisini vera møguligt at innlesa eftirlønina, á sama hátt sum í dag

Lønarmarkamótið út til arbeiðsgevararnar má:
- samstundis sum nýggja record-formatið á lønarfílu skal kunna avgreiðast
- eisini(fram til 1. januar 2014) kunna avgreiða núverandi “gamla” record-format

Stutt kan sigast, at hesir teigar eru komnir afturat:

Lønarslag:
Verður í fyrstu atløgu altíð "Vanlig A-inntøka". Tá nýggi eftirlønar-reformurin fær gildið pr 1. januar 2014, tá fer at kunna veljast millum fleiri virði - men tað koma vit aftur til tá.

Viðmerkingarteigur (til lønina):
Tann viðmerking sum verður innlisin her, kemur at síggjast aftur í útgreiningini á kontoavritinum fyri lønina.

Eftirlønar regnr, kontonr, upphædd og viðmerking
Nýggir teigar at innlesa eftirlønina í.
Hesin viðmerkingar-teigurin hevur bert áhuga hjá tryggingarfeløgunum.

Samstundis, sum hesar broytingar verða verksettar (ætlandi 6. apríl 2013), verður 3270 Lønarskipanin niðurløgd.